# Tá øll á fólkatingi hugdu niður...

HØGNI HOYDAL



**Tann virðingin, ið seinastu árini miðvíst er vunnin fyri føroyingum á fólkatingi og víðari út í heim, fekk eitt dyggiligt afturstig, tá Edmund Joensen í eini undirbrotligari sambandsrøðu gjørdi føroyingar til ómyndug stakkaladýr, ið mugu bidda Danmark um pening fyri egið ábyrgdarloysi**

Sjáldan havi eg fingið so nógvar afturmeldingar frá politikarum úr øllum flokkum á fólkatingi, sum mikudagin 29. mai í ár. Fólkatingið hevði endaorðaskifti, tey kalla, har støðan sum heild í bæði uttanríkispolitikki og innanlandspolitikki er á skránni.

Sjálvur helt eg eina røðu, har eg legði dentin á uttanríkis- og heimspolitikkin. Frá altjóða fíggjar- og orkukreppuni og tørvin á, at heimsins fólkarræði standa saman um at leggja um framleiðsluhættir og orkunýtslu og stjórna tí ótálmaða fíggjarmarknaðinum. Til tann sosiala ójavnan í heiminum, støðuna í Miðeystri og Asia, og vandan fyri nýggjum blóðugum kríggjum, um ikki heimsins lond nýta kreppuna til veruligar broytingar og umleggingar.

**Ostaklokkan í heimastýrinum**

Endaði røðuna við at vísa á, at føroyska fullveldistríðið snýr seg um at berja okkum burturúr teirri undirbrotligu og ábyrgdarleysu ostaklokku undir heimastýrinum, har vit halda, at onkur annar skal verja okkum móti heimsins gongd og avbjóðingum, og at vit skulu sleppa undan at býta okkara egnu samfelagsvirðir rættvíst. Setningurin er, at Føroyar fáa beinleiðis atgongd til altjóða samstarv og taka ábyrgd av okkara egna búskapi og luti í heiminum. Vit kunnu ikki sita sum áskoðarar og bara rópa eftir leikarunum á vøllinum, men mugu sjálvi fara á vøllin at leika og standa okkara royndir.

Vísti á, at síðani fullveldisgongdin varð parkerað undir ABC-flokkana tilvild í Føroyum, var øll búskaparlig og politiskt ábyrgd slept – og at tað neyvan fór at verða leingi, áðrenn onkur teirra kom til Danmarkar at bidda um hjálp til tess at sleppa undan skeivu politisku gerðunum hjá sær sjálvum.

**Sjón gekk fyri søgn**

Politikarar úr flestu flokkum komu aftur í tingsalin at práta og róstu røðuni. Men teir hildu, at eg hevði tikið dekan ov rívan til um, at sitandi stýri í Føroyum fór at biðja um pening úr Danmark.

Men í somu løtu trein Edmund Joensen upp á røðarapallin. Tað var sum at hoyra røddir úr fortíðini. Sum tá ein bólkur av føroyskum bøndum skrivaði til kong í 1850'unum og bønaðu hann um ikki at taka av Kongliga Einahandilin, tí tað fór at verða til skaða fyri "Det fattige folk udi Færø", sum bert kundi liva, um kongur ambætaði teimum og vísti teimum vælvild.

Edmund Joensen greiddi frá, at føroyingar høvdu ongan kjans at klára seg, um tað ikki var fyri danska hjálp, og hann takkaði so miriliga donsku stjórnini fyri at hava loyvt føroyingum at verða partur av danskari lóggávu – tí annars høvdu vit ikki staðið á fótum nú. Síðani harmaðist hann um fullveldislandsstýrið frá 1998-2004, og um at føroyingar høvdu tikið politiska ábyrgd av málsøkjum fyri eina stóra upphædd og hartil høvdu fryst sonevndu blokkveitingina.

Edmund Joensen endaði við at siga, at nú megnaðu føroyingar so lítið, at tað var neyðugt at hækka blokkin aftur!

Men eftir sat allur fólkatingssalurin og hugdi niður. Tey, sum eg hevði staðið og prátað við, søgdu, at hesum høvdu tey tó ikki trúð, og bóðu meg um umbering fyri at tey høvdu hildið meg vera ov hvassan, tá eg lýsti støðuna í føroyskum politikki.

**Frels okkum frá okkum sjálvum**

Valdi at gera viðmerking til Edmund Joensen, har eg spurdi, um hann veruliga meinti tað, hann segði. At tá hansara flokkur hevði sitið á fíggjarmálum í 4 ár og nú hevði leiðsluna í landsstýrinum, hevði givið skattalættar fyri 400 milliónir árliga og slept allari fíggjarstýring, so bóðu teir nú Danmark um at bjarga sær frá egnum ábyrgdarloysi?

Kundi havt lagt afturat – men vildi ikki siga tað á fólkatingi – at við stuðli frá Edmundi Joensen hava ABC-flokkarnir givið skattalættar fyri 400 mió., sum bert hava hækkað kostnaðarstøðið og grivið djúpar gjáir ímillum samfelagsólkar. Uppsagt allar avtalur við kommunur um fíggjarloft. Tømt landskassan við undirskotum ár eftir ár, hóast øll hjólini mólu skjótari og skjótari og onki arbeiðsloysi var. Forðað fyri loysnum, har útlendsk arbeiðsmegi kundi sleppa til landið. Slept øllum íløguætlanunum, ið vórðu lagdar undanfarnu árini. Givið serligar skattafyrimunir til fíggjarliga spekulasjón. Yvirtrekt játtanir í heimildarloysi fyri omanfyri 300 mió., meðan sambandsflokkurin sat við fíggarmálum (hetta váttaði Hans Pauli Strøm í vikuni). Flutt skúlar og steðgað íløgum, sum hava havt meirkostnað við sær fyri omanfyri 100 mió. Og enn hevur ongin tikið ábyrgd ella gjørt nakað tiltak.

Leggja vit bara hesar upphæddir saman, síggja vit skjótt, at hallið hjá landskassanum hevði verið burtur, um bara eitt minstamark av ábyrgd hevði verið sýnd undanfarnu 4 árini. Men um ynskt verður at liva politiskt av danskari hjálp og at skumpa ábyrgdina víðari til onnur, so er tað jú so lætt at skapa ta støðuna sjálv.

Tann flokkur, sum hevur vanstýrt búskapinum í Fíggjarmálaráðnum, situr nú í løgmanssessinum. Og tann løgmaður, sum hevði evstu ábyrgdina av vanstýringini, situr nú í fíggjarmálaráðharrasessinum – og í 10 mánaðir hava teir onki atak gjørt, men hava bert víst til danskar loysnir.

**Hvat hyggja fólk niður á?**

Á fólkatingi hugdu tey niður undir røðu Edmundar. Eisini forsætisráðharrin, hóast hann kortini segði seg ikki vera ófúsan at hjálpa sínum bróðurflokki, sambandsflokkinum, við pengum (og soleiðis verður politiska valdið eisini keypt, sum gonding hevur verið undir heimastýrinum). Kaj Leo Johannesen, løgmaður, hevur síðani sagt alment, at hann og hansara flokkur stuðla boðskapinum hjá Edmundi. Sanniliga ein politisk leiðsla, ið setur stór mál og kýtir seg fyri at taka ábyrgd.

Verri er, at tann virðingin, ið miðvíst er vunnin millum vanligar danskar politikarar fyri føroyingum, fór longur niður. Boðskapurin fer eisini út til allar útlendskar sendistovur í Keypmannahavn og til útlendsk fjølmiðlafólk.

Úrslitið er, at ikki bert hyggja fólk niður, tí tað er so pínligt at lurta eftir undirbrotligum og nalvaskoðandi røðum. Tey kunnu eisini fara at hyggja niður á føroyingar og Føroyar sum heild.

Hesum eiga vit ikki at finna okkum í.

---

**Eftirskrivt:**

At so ein útvarpsmaður tekur hetta málið upp og letur Edmund Joensen billa fólki inn, at danskir pengar gjalda fyri sosialu skipanirnar í Føroyum, og ikki setur Edmundi nakran spurning um egna ábyrgd og hvussu vit býta tey virði, ið fólk sjálv skapa í Føroyum, sigur rættiliga nógv um, hvussu undirbrotligheitin kann fáa fastartøkur. Útvarpsmaðurin hevði bert spurningar um, hvussu stórur møguleiki var fyri at blokkurin kundi hækkast aftur!

# Blokkurin kann tiðnast aftur

EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður



**Danska stjórnin er sinnað at viðgera spurningin um at strika verandi fastfrysting av ríkisveitingini, um landsstýrið ynskir tað. Hetta váttar danski forsætisráðharrin, Lars Løkke Rasmussen**

Endaorðaskiftið í Fólkatinginum mikudagin var áhugavert.

Tað vísti, at møguligt er at viðgera spurningin um at strika verandi fastfrysting av ríkisveitingini. Fastfrystingin hevur verið galdandi síðani 2001 og kostar samfelagnum uml. 110 mió. kr. árliga.

Fastfrystingin merkir, at ríkisveitingin er ein føst upphædd ár undan ári. Meðan alt annað í samfelagnum náttúrliga hækkar í prísi, stendur virðið á ríkisveitingini í stað. Soleiðis gerst veitingin í veruleikanum støðugt minni verd.

Ríkisveitingin er eitt týðandi íkast til føroyska búskapin og er 615,5 mió. kr. árliga sambært avtalu millum Landsstýrið og stjórnina.

Tá hugsað verður um vánaligu búskaparstøðuna í Føroyum, er tíðin komin til at strika fastfrystingina av ríkisveitingini. Búskaparliga sæð er fastfrystingin sera óklók. Hetta førdi undirritaði fram í endaorðaskiftinum mikudagin.

Í svari sínum staðfesti forsætisráðharrin, at fastlæsingin er gjørd eftir ynski úr Føroyum.

- Kemur ein nýggj støða, ella eitt nýtt ynski kemur úr Føroyum, eru vit sjálvandi sinnað at taka málið upp til nýggja viðgerð, segði Lars Løkke Rasmussen.

Sostatt ber væl til at taka fastfrystingina av ríkisveitingini upp av nýggjum, um Landsstýrið setur fram eitt tílíkt ynski.

Í løtuni arbeiðir Landsstýrið við einum kreppupakka, sum ber í sær stórar sparingar á mongum økjum í Føroyum. M.a. skal sparast innan eina røð av vælferðartænastum. Mítt uppskot er, at Landsstýrið – sum part av kreppupakkanum – heitir á stjórnina um at strika fastlæsingina av ríkisveitingini. Hetta gevur helst góðar 100 mió. kr. árliga í inntøku!

Samfelag okkara hevur í hesum tíðum brúk fyri hvørjari krónu, ið útvegast kann.

Landsstýrið eigur ikki at spara hjá teimum veikastu í samfelagnum og samstundis tveita stórar milliónaupphæddir burtur orsakað av Misskiltari Nationalismu.

# Tillukku til »Óðamansgarð«

HELENA DAM Á NEYSTABØ
landsstýriskvinna í mentamálum



Enn einaferð hava okkara úrmælingar á mentanarpallinum prógvað, at tey skara framúr, eisini á altjóða leikpalli. Sunleif Rasmussen, tónaskald er í dag tilnevndur til íslendsku leiklistaheiðurslønina "Grímuna" fyri tónleikin, sum hann hevur komponerað til operuna "Í Óðamansgarði". Eisini Lárus Bjørnsson er tilnevndur til eina Grímu fyri avrík sítt at skipa ljóssetingina til Óðamansgarð.

Hjartaliga tillukku til Sunleif Rasmussen og til tykkum øll, sjónleikarar, tónleikarar, sangarar, dansarar, palsmiðir, Aldubáruna, Tjóðpallin og øll onnur, sum hava lagt lív og sál í at skapa eitt listaverk á høgum, sera høgum støði.

Tit eru besta prógv um, at ein íløgu í egna mentan, er tann besta íløgan, mann kann gera.

Tá ið operan varð framførd í Norðurlandahúsinum í oktober í 2006, eydnaðist tað mær tíbetur at fáa eitt atgongumerki.

Tað var eitt stórt listarligt upplivilsi. Eg eri eingin operaummælari, men eg minnist, at tað sum serliga hugtók meg var tann væleydnaða samansjóðingin av nógvum ymiskum listargreinum, nútímans tónleiki hjá Sunnleifi og operasangi á høgum støði, dansi og ballett eins og sjónleiki - somuleiðis á hægsta stigi. Burturúr hesum spurdist eitt nýtt og spennandi listaverk. Pallmyndin var hugtakandi og avbjóðandi, eitt visuelt listaverk í sjálvum sær. Hugsaði tá ikki so nógv um, at tað var ljóslist, ið setti sín dám á, men skilji tað nú, ið Lárus er tilnevndur eina Grímu fyri avrik sítt.

Ein gomul søga um teir afturvendandi stóru tilveruspurningarnar í nýggjum kørmum og hami. Og so at tað bar til at seta so stórt listaverk upp í Føroyum, har ressursurnar eru so avmarkaðar. Flott!

Enn einaferð. Hjartaliga tillukku. Vóni, at tað fer at eydnast at koma á pall í øðrum londum eisini.

---

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.